**Karla Heinesen og Vígdis Mellemgaard**
**úr 9. a í Vestmanna skúla**

**Løgtingsmál nr. 6/2012: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ferðslu (prutl)**

# Uppskot
# til
# løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ferðslu (prutl)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 65 frá 9. september 1963 um ferðslu, sum kunngjørd við løgtingslógarkunngerð nr. 14 frá 2. mars 1988, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 49 frá 11. mai 2009, verða hesar broytingar gjørdar:

**1)** Í § 2, III, C. Litra c) verður "30 km" broytt til: "50 km".

**2)** § 18a, stk. 4 verður strikað.

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, hon er kunngjørd.

## Viðmerkingar

Við hesum broytingum verður loyvt bæði vanligum prutlum/skutarum og teimum sokallaðu EU-skutarunum, at koyra 50 km um tíman.

Vit halda, at hendan broyting skal gerast, tí at vit hava frætt, at tey flestu óhappini henda, tí at bilarnir kroysta prutlini/skutararnar inn ímóti vegkantinum, og tað tarnar eisini aðrari ferðslu, um ein skutari er frammanfyri, og tað ikki er pláss at yvirhála.

Vísast skal á, at kunngerð nr. 82, frá 13. desember 1963 um cyklur við hjálpimotori (prutl), sum seinast broytt við kunngerð nr. 102 frá 4. desember 1980, má dagførast eftir lógarbroytingina

**Á Løgtingi, tann 6. februar 2012**

Karla Heinesen Vigdis Mellemgaard